## Bót til burka

Í Fraklandi skal tjóðartingið taka støðu til eitt lógaruppskot, sum sigur, at kvinnur skulu fáa 750 evrur ella einar 5.600 krónur í bót fyri at ganga í burka. Ein talsmaður fyri stjórnarflokkin UMP sigur við blaðið Le Figaro, at menn, sum noyða kvinnur at ganga í burka og niqab, skulu fáa uppaftur størri bót. Fleiri halda, at uppskotið skerjir trúarfrælsið í Fraklandi, men tað heldur stjórnin ikki. Sum skilst verður uppskotið lagt fyri tjóðartingið seinni í hesum mánaðinum, men tað kemur ikki til viðgerðar fyrr enn eftir kommunuvalið, sum verður í mars, skrivar Le Figaro.



## Loysa marknatrætu

Í næstu viku fara grannalondini Irak og Iran undir truplar samráðingar, sum eftir ætlanini skulu staðfesta markið millum londini. Markið landanna milælum er næstan 1.460 kilometrar langt, og tá er eisini talan um sjómark í Persaflógvanum. Fyri einum mánað síðani vildu iraksku myndugleikarnir vera við, at iranskir hermenn vóru komnir inn um markið í oljuøkinum Fauqa, og at teir høvdu verið har nakrar dagar. Tá varð eisini sagt, at tey seinastu árini hava iranskir hermenn javnan verið inni í irakskum øki. Árini frá 1980 til 1988 var blóðugt kríggj millum Irak og Iran.

# Útlendskar íløgur til Føroya

**Í eitt hálvt ár hevur deildin Invest in the Faroes arbeitt við einum áliti um, hvussu vit fáa útlendingar at gera íløgur í føroyskt vinnulív**

ÍLØGUR
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*
*myndir: Jens Kristian Vang*



*Kitty May Ellefsen og Erika Anne Hayfield hava staðið fyri frágreiðingini, sum Johan Dahl, vinnumálaráðharri, legði fram í morgun*

Á tíðindafundi í morgun legði deildin fyri Íløgur í Føryum fram álit um, hvussu føroyingar kunnu draga útlendskan kapital inn í okkara vinnulív.

Vanligi føroyingurin er vitandi um, at nakað av útlendskum kapitali longu nú er í føroyskum vinnulívi, og at hetta umfatar eitt nú SMS, Vodafone, bankarnar og oljufeløgini. Men eitt yvirlit, sum arbeiðsbólkurin hevur gjørt, vísir, at útlendskar íløgur finnast í heili 22 føroyskur fyritøkum.

Men ynski er um at fáa fleiri útlendingar at gera íløgur í Føroyum.

Royndir uttanlands vísa, at londini við útlendskum íløgum hava størstu búskaparligu framgongdina. Og kanningar í Danmark vísa, at hóast tað í dag bert finnast útlendskar íløgur í einum prosenti av privastu fyritøkunum, umboða hesar 14 prosent av samlaðu arbeiðsmegini, sigur Johan Dahl, landsstýrismaður í vinnumálum.

Kitty May Ellefsen, sum er leiðari á deildini fyri Invest in the Faroes, sigur, at tey hava lagt dent á at kanna, hvussu londini uttan um okkum gera, fyri at draga útlendskan kapital til sín. Serliga hevur verið hugt eftir, hvussu danir gera, men eisini lond sum Malta og Cypros hevur verið hugt eftir, eins og samstarvsavtala er gjørd við felag í New York, sum hevur royndir at marknaðarføra Danmark sum íløguland.



*Stjórar við royndum av útlendskum kapitali í fyritøkum teirra, Niels Mortensen, SMS, Bjarni Askham Bjarnason, Vodafone og Regim W. Dalsgaard, Globi*

### Føroyskar royndir

Ein av teimum, sum hava royndir við fremmandum kapitali í sínari fyritøku, er Niels Mortensen, stjóri í SMS, og hann hevur bara gott at bera hesum íleggingarformi.

- Tað er í minstan mun pengarnir, sum telja í hesum sambandi. Tað er nógv meiri tað know-how, ið vit fáa tilført við kepitalinum, sum telur. Nú eru vit sjálvandi í teirri hepnu støðu, at okkara íleggjarar sjálvir eru innan somu bransju, og tað er dagliga sambandi, ið hevur mest at siga, sigur Niels Mortensen.

Tað er tí ikki bert sjálv kapitalinnspræningin ella kvarttalsligu nevndarfundirnir, sum hava størsta týdningin í hesum føri.

- Eg kann bara av hjarta viðmæla, at fyritøkur taka inn útlendskar íleggjarar, sigur Niels Mortensen.

Eisini Bjarni A. Bjarnason hevur royndir við útlendskum kapitali, og hóast tað í førinum Vodafone var tungt at vekja áhugan hjá útlendskum íleggjarum, so skal týdningurin av hesum á ongan hátt undirmetast.

Tað er eisini púra greitt, at føroyingar eru farnir frá hugsjónini um heldur at eiga 100% av ongum enn 25% av nógvum. Tað sum telur, er at skapa vøkstur, fyritøku og samfelagi at gagni.

### Fleiri møguleikar

Johan Dahl heldur, at møguleiki er hjá fleiri føryskum fyritøkum at draga útlendskar íløgur til sín, og ein upplagdur møguleiki er innan maritima økið.

Útlendingar eru longu íleggjarar í til dømis Atlantsfarinum, Sea Freeze, Marine Harvest, Atlantic Biotechnology og øðrum føroyskum reiðaríium. Og møguleikarnir fyri øðrum verkætlanum eru upplagdir.

- Talan kann til dømis verða um Green IQ, Faroe Cod Farming í Hvalba ella HSJ, sum allar eru maritimt relateraðar fyritøkur, sigur Johan Dahl.

Og tá er mest upplagdi møguleikin, nevniliga innan kolvetni, als ikki nevndur.

- Tað, sum nú fer at henda, er at vit við hesum amboðnum í hondunum (ísandi til frágreiðingina hjá arbeiðsbólkinum) fara undir at marknaðarføra Føroyar sum eitt íløguland, sigur Johan Dahl.

Hetta fer at verða gjørt í samstarvi við Uttanríkisráðið, sum umsitur ferðavinnu og tónleikavinnu.

- Uttanríkisráðið hevur einar tríggjar milliónir at marknaðarføra Føroyar við, og Vinnumálaráðið hevur sett eina millión av til hesa verkætlanina, so tilsamans eiga vit at røkka rímiliga langt, sigur Johan Dahl.

Hann hevur ikki beinleiðis sett sær nakað mál fyri, hvat succes-kriteriið er í sambandi við hesa verkætlanina.

- Men fáa vit ein ella tveir útlendskar íleggjarar til Førya við hesi marknaðarføring, so eru vit væl nøgd. Og ongantíð betri, um tað gerast til fleiri, sigur Johan Dahl, vinnumálaráðharri.